Álit

í

løgtingsmáli nr. 107/2025: Uppskot til løgtingslóg um fyrra byggistig í verkætlan um at byggja tvey sambýlir í Miðvági til fólk við ávikavist menningartarni og samansettum avbjóðingum, harímillum autismu, og til fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum

Landsstýriskvinnan í almanna- og bústaðamálum, Margit Stórá, hevur lagt málið fram 6. mai 2026, og eftir 1. viðgerð 8. mai 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. mai 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í almanna- og bústaðamálum, Margit Stórá, saman við Almannaverkinum og Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at heimila landsstýriskvinnuni við almanna- og bústaðamálum at fara undir at dagføra og umvæla eina ogn í Miðvági, ið skal nýtast sum sambýli. Seinni er ætlanin at byggja ein nýggjan bygning afturat í Miðvági, somuleiðis til sambýli.

Samlaða verkætlanin er í tveimum byggistigum, og hetta snýr seg bara um fyrra byggistigið.

Í hesum byggistiginum, sum er at umvæla ein verandi bygning, verður pláss til 7 fólk við menningartarni og samansettum avbjóðingum, harímillum autismu.

Í seinna byggistiginum, sum ikki er umfatað av hesum lógaruppskotinum, er ætlanin at byggja eitt nýtt sambýli, har pláss verður til 12 fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum.

Ætlanin er, at alt arbeiðið skal verða liðugt í 2029.

Nýggju sambýlini koma ístaðin fyri trý sambýli í Vágum, sum í dag húsast í sethúsum, sum ikki eru bygd til endamálið. Sethúsini hóska ikki at verða nýtt til sambýli, og talan er sum heild ikki um nakra góða og virðiliga loysn til varandi heim.

Útreiðslurnar fyri byggistig 1 kunnu í mesta lagi vera 20,9 mió. kr. Higartil eru brúktar 12,4 mió. kr. sum ikki eru við í teimum 20,9 mió. kr. So samlaði kostnaðurin av byggistigi 1 verður 33,3 mió. kr.

Nýggju stovnarnir fara at hava pláss fyri tilsamans 19 búfólkum, sum eru trý fleiri enn í verandi stovnum, sum eru í Sandavági og í Sørvági. Stovnurin í Sandavági húsast í eini landsogn, sum kann seljast tá klárt verður at flyta virksemið í nýggju hølini, og stovnarnir í Sørvági húsast í leigaðum hølum, og tann leigan kann sigast upp, tá klárt verður at flyta í nýggju hølini.

Viðvíkjandi rakstrarkostnaðinum verður mett, at tá bæði byggistigini eru liðug, fara sambýlini, íroknað fleiri starvsfólk, betri tænastu, og við trimum eyka búplássum, at hava øktan rakstur við sær á umleið 1,3 mió. kr. Tó lækkar sambærligi eindarkostnaðurin úr 1,1 mió. kr. niður í 897 tús. kr.

Undir 1. viðgerð av uppskotinum varð spurningur settur við, hví onkur av viðkomandi feløgum, ið umboða búfólkini, ikki høvdu latið hoyringarskriv inn. Landsstýriskvinnan hevur upplýst fyri Fíggjarnevndini, at skipað varð fyri einum hoyringarfundi, og at okkurt felag, sum var við á tí fundinum, lat ikki hoyringarskriv inn, helst tí at tey longu vóru hoyrd.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 18. mai 2026

Helgi Abrahamsen formaður	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur næstforkvinna	Bill Justinussen
Bjarni Hammer	Eyðgunn Samuelsen	Sirið Stenberg
	Ruth Vang	